


*Sangurin var í hásæti á LUS. Her sæst LUS-Worshipband syngja fyri til felagssangin*
*Mynd: Maria Mellemgaard*

væl hjá teimum, serliga tá ið hugsað verður um, at tey einans høvdu umleið 3 tímar at venja sangirnar. Fyriskiparnir av tiltakinum hava uppiborið rós, tí at alt riggaði sera væl. Leiðslan av kvøldunum var framúr og skráin var góð og fjølbroytt.

**FA-Cup finalan**

Leygardagin seinnapart vóru breytir á skránni. Har var møguleiki at fara ein gongutúr, spæla fótbólt ella flogbólt, svimja ella fara til ein áhugatíma um, hvussu tú hevur eina andakt. Nógv valdu breytina, sum varð kallað "FA-Cup finalan". Tað varð farið í SÍF-húsið at hyggja at FA-Cup finaluni millum Liverpool og West Ham. Tað sótu sera nógv í reyðlittum blusum og hugdu at dystinum. Tað var sera nær við, at øll legan varð oyðiløgd fyri teir mongu Liverpool-fjepparnar, tí at Liverpool var aftanfyri, tá ið fáir minuttir vóru eftir. Liverpool fekk tó javnað, og teir vunnu til endans uppá brotssparkskapping. Rómurin var øgiligur millum tey flestu, og smílini hvurvu ikki aftur alla leguna.

**Vitniløtan**

Leygarkvøldið var ein bíblutími við komandi ungdómsráðgevanum Pól Johannesen. Aftaná var sang- og vitniløta, og nógv nýttu møguleikan at siga nøkur orð. Tað var heilt greitt, at nógv høvdu fingið sera nógv burturúr leguni, sum tey fegin vildu greiða øðrum frá.

Sunnudagin var farið í kirkju og síðani var bara eftir at rudda av og siga farvæl. Ungdómar frá øllum landinum høvdu verið samlaðir í fýra dagar og fóru nú hvør til sítt.



*Tríggir menn, sum eru í starvi hjá Heimamissiónini*
*Frá vinstru: Frants Jensen (Trúboðin), Vagn Foldbo (aðalskrivari) og Tom Skaale (trúboðari)*

# Nýggjur ungdómsráðgevi



*Pól Johannesen úr Hvannasundi verður nýggju ungdómsráðgevi*

Pól Johannesen luttók á LUS, har ið hann hevði ein áhugatíma og ein bíbliutíma. Á LUS varð avdúkað, at hann verður næsti ungdómsráðgevi eftir Hans Kristian Justesen, sum gevst í starvinum. Hans Kristian hevur verið ungdómsráðgevi í fimm ár, og hann hevur gjørt eitt megnar arbeiði.

Pól Johannesen er trúboðari hjá KFUM og K í Klaksvík, men hann fer at gevast har í summar og byrjar í nýggja starvinum 1. september. Pól Johannesen er vanur við at havast við ung, og hann dugir sera væl at tosa soleiðis, at tey ungu lurta.

- Eg varð spurdur av Heimamissiónini, um eg var áhugaður í hesum starvinum, og eftir at hava hugsað um tað í eina tíð, havi eg so tikið av. Hetta er ein ørðvísi avbjóðing enn at vera trúboðari hjá KFUM og K. Tað starvið hevur mær dámt sera væl, men nu havi eg so valt at taka ímóti einari nýggjari avbjóðing. Mær dámar væl at fáast við ung, so tað verður spennandi. Tað verður torført at taka arvin upp eftir Hans Kristiani, men eg eri í øllum førum spentur uppá tað, sigur Pól Johannesen.

Pól Johannesen hevur nógvar royndir við at hava ungdómsmøti, og hansara lætta og lívliga lyndi, skuldi gjørt hann vælegnaðan til starvið. Sosialurin ynskir Pól og Heimamissiónini góða eydnu við nýggja samstarvinum.

**HK**

# Lisa í Garði Patursson



*Lisa í Garði Patursson dámdi sera væl á Landsungdómsstevnuni á Giljanesi seinasta vikuskifti*

18 ár
Kirkjubø

*Hvussu dámdi tær LUS?*

Mær dámdi ordiliga væl! Tað er deiligt at hava eitt so stórt tiltak at fara til. Stuttligt at síggja fólk frá øllum landinum.

*Hvat hevur tú persónliga fingið burturúr?*

Eg havi fingið nógv burturúr. Nógvar áminningar og uppfrískan til bíbliutímarnar. Nú er hetta fjórðu ferð, at eg eri á LUS, so eg eri nokkso gomul í garði í hesum sambandi. Tá er tað serliga stuttligt at síggja, at tey heilt ungu fáa nakað burturúr.

*Hevur tú fingið nógvar nýggjar vinir her?*

Eg kendi nógv frammanundan, men eg eri komin at kenna summi enn betri á leguni. Til LUS síggi eg vinir, sum eg annars ikki síggi so ofta. Tað er tað, sum ger LUS til nakað serligt. Øll seta ein kross í kalendaran, tá ið LUS verður.

**HK**